# M.A. Jacobsens virðislønirnar latnar

**Týskvøldið vórðu M.A. Jacobsens virðislønirnar og Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs latnar**

HEIÐURSLØNIR
*Orð: Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Á samkomu í sjónleikarhúsinum týskvøldið vórðu M.A. Jacobsens virðislønirnar og Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs latnar.

Virðislønirnar hava seinastu árini verið latnar á føðingardegi M.A.Jacobsens, sum er 17. september. Tað var í 1958, at Rithøvundafelag Føroya, sum var sett á stovn árið fyri, heitti á Tórshavnar býráð um at seta á stovn eina árliga bókmentavirðisløn í navni Mads Andriasar.

Í nevndini fyri Mentanarvirðisløn M. A. Jacobsens eru fimm limir: Egon Hansen, Jákup Jacobsen og Erling Isholm, valdir av býráðnum. Gunnar Hoydal er valdur av Rithøvundafelagnum og Turið Sigurðardóttir er vald av Fróðskaparsetri Føroya.

Nevndin hevur heimild at lata 3 virðislønir: eina fyri yrkisbókmentir, eina fyri fagurbókmentir og eina fyri mentanaravrik. Virðislønin fyri mentanaravrik verður latin fólki, sum hevur avrikað eitthvørt, sum hevur týdning fyri føroyska mentan. Nevndin kann gera av, ikki at lata virðislønirnar, ella onkra teirra, um hon heldur, at einki verk ella avrik er virðislønarvert. Men, sum tit síggja í skránni, verða 3 virðislønir latnar í ár.

Í nevndini fyri Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs eru eisini fimm limir, har av 2 eru fastir. Annar er barnabókavørðurin, sum er Malan Hilmarsdóttir. Hon er eisini skrivari. Hin er formaðurin í mentamálanevndini, sum samstundis er formaður í nevndini. Í hesum valskeiðinum er tað Heðin Mortensen. Hildur Eyðunsdóttir og Poulina Slættanes eru valdar av býráðnum og Hervør Jákupsson er vald av Felagslærararáðnum í Havn.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð fyrstu ferð handað í 1976.

Virðislønirnar eru allar 20.000 kr. í ár.

Aðrstaðni á síðunum sæst meira um teir ymsu vinnararnar.

Sosialurin ynskir teimum øllum hjartaliga tillukku.

## Vit hava øll eitt summarhús...



*Evnisliga er bókin landnám í føroyskum bókmentum, varð sagt um bókina "Tá eg havi málað summarhúsið", sum Oddvør Johansen nú er heiðrað fyri*

Fyri skaldsøgu sína »Tá eg havi málað summarhúsið« fekk Oddvør Johansen M.A. Jacobsen virðislønina fyri fagrar bókmentir

Tað gjørdist Oddvør Johansen, sum fekk virðisløn M.A. Jacobsen virðislønina fyri fagrar bókmentir. Hon fekk virðislønina fyri skaldsøgu sína "Tá eg havi málað summarhúsið". Bókin snýr seg um unglingan Pedda, ið fyllir seytjan ár hin 6. oktober 1992, tá Sjóvinnubankin fór av knóranum. Hesin sami Pedda hevur rótað seg út í rúsevnismisnýtsla, og hann kemur skjótt í trupulleikar við løgregluna. Í bókini fylgja vit honum og hansara vinfólkum í svára tíðarskeiðinum i nítiárunum í Føroyum.

Talan er um níggjundu bókina hjá Oddvør.

Oddvør er fødd í 1941, og hon telist millum teir meira virknu rithøvundar í Føroyum hesi seinnu árini. Hetta er heldur ikki fyrstu ferð, at hon fær M.A. Jacobsens virðisløn. Tað var í 1983 fyri skaldsøguna Lívsins summar, ið er eisini umsett til bæði danskt og svenskt.

–Tað er ikki minni gott hesaferð. Fyrstu ferð var so óroynd og var ikki rættiliga komin inn í henda heimin sum rithøvundi, men nú er tað eitt rættiligt herðaklapp, sigur Oddvør Johansen.

Turið Sigurðardóttir, umboðandi dómsnevndina, segði, at bókin tekur rúsevni upp sum evni, og hetta er forkunnugt í føroyskum bókmentum.

Sjálv takkaði Oddvør fyri heiðurin. Hon segði, at hon kendi tað sum ein heiður at sleppa at skriva á føroyskum máli.

Grundgevingin er soljóðandi:

»Í Skaldsøguni »Tá ið havi málað« summarhúsið« er rúsevnisvandamálið fyrstu ferð tikið upp í føroyskum bókmentum. Nortið verður við stórar spurningar sum kriminaliseringina av hassji, sum kann hava verri evnismisnýtslu og onnur lógarbrot við sær. Hetta evnið verður lýst innanífrá gjøgnum frásøgnina hjá tí unga Pedda. Lív hansara og tað hjá vinmonnunum eru dømisøgur um, hvussu hassj og onnur rúsevni kunnu skeikla lívsleiðina.

Evnisliga er bókin landnám í føroyskum bókmentum. Hon sigur frá búningarárunum hjá nøkrum dreingjum í einum avgerandi tíðarskeiði í Føroya søgu, 1990-árunum.

Hon setir á nøkur evni, ið tola neyvari viðgerð.«

–Vit hava øll eitt summarhús, ið vit ætla at mála, segði Oddvør Johansen, tá hon takkaði fyri heiðurin á samkomu seinnapartin týsdagin.

Sambært Oddvør sjálvari er næsta skaldsøgan rættiliga langt burturi.

–Í løtuni haldi eg eina skrivipausu, staðfestir Oddvør Johansen.

## Glað fyri at geva aftur



*Sólrun Michelsen heldur tað vera spennandi at skriva fyri børnum*

**Fyri hennara barna- og ungdómsbøkur fekk Sólrún Michelsen Barnabóka virðisløn Tórshavnar býráðs**

HEIÐURSLØN
*Heri á Rógvi*

–Sólrún Michelsen hevur á livandi og løttum máli skrivað áhugaverdar, skemtiligar og spennandi søgur, sum børn og ung taka til sín. »Argjafrensar« og »Útiløgukattar« lýsa á sera fløvandi, skemtiligan og sannførandi hátt barna- og ungdómsár rithøvundans.

»Hini útvaldi« og »Geislasteinar« føra okkum inn í ein spennandi, hendingaríkan og hugtakandi ævintýrheim.

Sólrún Michelsen hevur við bókum sínum sýnt, at hon spennir víða, hevur hugflog og fjølbroyttar gávur.

Soleiðis ljóðaði tað í grundgevingini hjá dómsnevndini at lata Sólrún Michelsen barnabókavirðisløn Tórshavnar býrað.

–Eg eri glað fyri at kunna geva aftur, sigur Sólrún Michelsen.

Í sínari takkarrøðu segði Sólrún m.a., at hon var sera fegin um at hava fingið heiðurin. Hon nevndi, at hon altíð hevði glað fyri at lesa og bøkur sum heild. Hon helt, at hóast børn høvdu nógv onnur tilboð, so vóru framvegis góðar vónir, tí nógvum børnum dámar væl at lesa.

Sjálv hevur hon altíð hildið, at tað er sera spennandi at skriva fyri. Tú mást líkasum skriva í fleir løgum, segði hon.

–Børn eru eisini teir mest erligu lesararnir, sigur Sólrún Michelsen.

Hon leðgi harafturat dent á, at tað hevur stóran týdning, at lisið verður fyri børnum.

Tað var kanska eitt sindur seint, at Sólrún byrjaði at skriva, men síðani hon byrjaði, hevur hon ikki steðga áaftur.



*Kristian fekk serligu virðislønina fyri mentanaravrik fyri sítt íkast til føroyska mentan*

## Kristian Blak heiðraður fyri mentanaravrik

**Virðisløn M.A. Jacobsen fyri mentanaravrik varð latin Kristiani Blak**

HEIÐURSLØN
*Heri á Rógvi*

Á føðingardegi Mads Andrias Jacobsens vórður virðislønirnar í hansara navnið handaðar á samkomu í Sjónleikarhúsinum seinnapartin.

Virðislønin fyri mentanaravrik varð latin tónleikaranum og tónasmiðinum Kristiani Blak.

Gunnar Hoydal, umboðandi dómsnevndina, segði, at Kristian Blak hevði gjørt nógv fyri føroyska mentan.

»Síðani hann kom til landið, hevur Kristian verið íbirtari, vegleiðari og luttakari í at kalla øllum tónleiki, frá fólkatónleiki, rytmiskum tónleiki til nýskrivaðan føroyskan partiturtónleik.

Lítillátin og ósjálvsøkin hevur hann saman við konu síni, Sharon, verið sálin í ótali av framførslum og framleiðslum, og verk teirra hevur víst okkum, hvønn týdning tað hugað fólk uttan úr heimi leitar til okkara og ríkar føroyska menta«.

Soljóðandi er grundgevingini hjá dómsnevndini fyri at heiðra Kristian Blak

Dómsnevndin nevndi, at Kristian Blak var sera lítillátin, og hetta prógvaði hann eisini í røðu sínari.

–Eg trívist best í samstarvi við onnur, og hendan virðislønin er samstundis eisini ein virðisløn til øll tey feløg og samstarv, har eg eri virkin, segði Kristian Blak.

Kristian tosaði eisini um, at hann var komin til Føroya sum tilflytari, og hann skuldi upprunaliga bara vera eitt ár í Føroyum, men valdi at vera hangandi í hesum partinum av heiminum.

–Í veruleikanum eru nógvar hurðar til restina av verðini í Føroyum, segði Kristian Blak.

Kristian kom til Føroya í 1974, og upprunaliga ætlani var bert at vera her í eitt ár, men steðgurin gjørdist naka drúgvari. Hann undirvísti frá byrjan av í Hoydølum á Studentaskúlanum- og HF-skeiðinum, og hetta hevði hann eisini gjørt í Danmark. Hann er útbúgvin cand.mag í tónleiki og fronskum, og hann undirvísti eisini í hesum lærugreinum í Hoydølum.

Hansara avrik sum tónleikari og tónasmiður eru at kalla øll gjørd í Føroyum ella í føroyskum høpi.

–Eg haldi tað var William Heinesen, sum segði, at tú verður hálaður inn, tá tað er brúk fyri einum, og tað var nakað tað sama, sum hendi við mær. Tú gerst partur av einum umhvørvi, og tað føroyska umhvørvið hevur mær altíð dámað sera væl, sigur Kristian Blak.

Hann hevur frá byrjan verið ógvuliga virkin innan føroyskt tónleikalív. Hann setti á stovn, saman við øðrum, bæði Spælimenninar í Hoydølum, Havnar Jazzfelag, Ygdrasil og annað.

Hann er virkin í einari longri røð av feløgum, eitt nú Tutl og Felagið føroysk tónaskøld. Sum nevnt metir hann, at viðurkenningin eigur at fella á hesar felagsskapir, og hann er eisini sera fegin um at hava fingið heiðurin í sambandi við síni mongu samstørv.

–Eg eri sera glaður fyri, at feløgini verða viðurkend. Vit hava allatíðina roynt at skapa umstøður fyri tónleikinum í Føroyum, men nú er tíðin komin hartil, at vit fáa hava betri umsiting, tí uppgávurnar veksa nógv, og hetta krevur eisini, at samfelagið tekur sær um reiggj og sigur, hvat tað ynskir, sigur Kristian Blak.

Hann hevði als ikki roknað við hesum heiðurinum, og hann fegnast almikið.

–Hetta gevur mær hug at halda fram. Seinastu mánaðirnar havi er verið fult upptikin so at siga hvønn dag, og eg kendi meg ógvuliga troyttan, men hetta gevur mær hug at halda fram við mínum arbeiði, sigur Kristian Blak.

Kristian Blak ætlar at halda fram í teimum bólkum, har hann er virkin, og hann hevur eisini onkra spennandi verkætlan í stoypiskeiðini.



*Fyri sína PhD. ritgerð um føroyska róðrarbátin fekk Andras Mortensen M.A. Jacobsens virðislønina fyri yrkisbókmentir*

## Andras Mortensen bestu yrkisbókmentina

**Ritgerðin hjá Andrasi Mortensen um føroyska bátin fekk virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir**

HEIÐURSLØN
*Heri á Rógvi*

Andras Mortensen fekk fyri ritgerð og bók sína um føroyska bátin handaða Virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir.

Gunnar Isholm, umboðandi dómsnevndina, segði á samkomu týskvøldið, at bókin hjá Andrasi, umframt at líka øll faklig krøv, eisini var ógvuliga spennandi og góð at lesa.

»Andras hevur í ritgerð síni »Hin føroyski róðrarbáturin« á dyggum søguvísindarligum grundarlagi greitt frá søguni um gamalt føroyskt bátasmíð, hvussu róðrarbáturin varð nýttur i dagligum yrki, og hvønn týdning hann hevði í føroyska samfelagnum«, stóð m.a. at lesa í grundgevingini frá dómsnevndini.

Víðari verður sagt:

»Tað var í tøkum tíma, at hetta evnið, sum í øldir hevði avgerandi týdning fyri alt lív í Føroyum, varð tikið upp til søguvísindaliga viðgerð, og nevndin ivast ikki í, at Andras við hesi ritgerð hevur givið landsmonnum sínum eitt í allar mátar virðismikið og fyrimyndarligt verk.«

Sjálvur gjørdi Andras ógvuliga lítið burturúr sær sjálvan, men nýtti heldur høvið at minnast á teir persónar, sum høvdu gjørt eitt stórt arbeiði fyri føroysk fornminni og sláa fyri í arbeiðinum hjá sær. Hann nýtti eisini høvið til at minnast aftur á M.A. Jacobsen sjálvan, og tað arbeiði, hann hevur gjørt fyri føroysk fornminni og samfelagið.

Hann fór undir arbeiðið, tí hann í starvi sínum á Føroya Fornminnissavnið skuldi hava bátarnar hjá savninum um hendi.

– Fyri meg hevur bókin um bátin ikki bara snúð seg um at skyna á, hvat var vert at goyma av bátum og ikki. Eg hugsi, at forvitni mítt heldur gjørdi, at upprunatrupulleikin bara gjørdist størri, sum áhugin vaks. Men eg haldi eisini, at eg kann siga, at tað fyri meg hevur serliga snúð seg um at skilja mentanarligar samanhangir úr fortíðini, sum hava týdning fyri tilveru okkara í dag, tí tað er hetta, sum bókin í grundini snýr seg um. Bátarnir úr fortíðini vóru tengdir at sosialum viðurskiftum, og tað er hetta, sum eg havi roynt at fanga, sigur Andras Mortensen

Ritgerðin er skrivað sum PhD. ritgerð á Fróðskaparsetri Føroya. Andras Mortensen er upprunaliga útbúgvin cand.mag í søgu og latín á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Ritgerðin er skrivað við stuðuli frá Statens Humanistiske Forskningsråd.

– Helst er tó alt ikki sagt og skrivað enn, og nógv er eftir at tríva í á sama øki, segði Andras Mortensen, tá hann takkaði býraðnum fyri heiðurin.